við Løgmannabreyt, 29. november 2023

Góðu næmingar og foreldur

*"Jólini nærkast í hvørjum….*" og sum vant verða onkrar broytingar í tímatalvuni. Her er eitt stutt yvirlit yvir skúlagongdina í desember mánað og kunning um, nær og hvussu jólahaldið verður í ár.

| | |
|---|---|
| Vika 48 | Flokkarnir pynta skúlan og stovurnar. |
| 1. - 13. desember | Vanlig skúlagongd. |
| 1. - 15. desember | Felags jólahugni, søga, undirhald og sangur í miðhøllini hvønn morgun kl. 9.10 - 9.30. |
| Hósdagin 7. desember | Musikantarnir í "Ljóð og leiki" hava tvær konsertir.<br>Kl. 9 fyri næmingum og kl. 17 fyri foreldur og avvarðandi. |
| Mánadagin 18. desember | Skúladagurin er frá kl. 8 til kl. 11.20.<br>Vit venja leik og sang til jólaframførsluna.<br>1., 2. og 3. flokkur kann fara í frítíðarskúla og frítíðartilboð sum vanligt kl. 11.20. |
| Týsdagin 19. desember | Allir næmingar møta í skúla kl. 8 og fáa frí kl. 12.<br>Fyrrapartin venja vit og leggja síðstu hond á jólaframførsluna.<br>1., 2. og 3. flokkur kann fara í frítíðarskúla og frítíðartilboð sum vanligt kl. 13.20.<br>Jólaframførslan verður kl. 16 til kl. 18.00 |
| Mikudagin 20. desember | Allir næmingar møta í skúla kl. 8 og fara í jólafrí kl. 12.<br>Vit fara til jólaguðstænastu í Hoyvíkar kirkju kl. 9.15.<br>Eftir guðstænastuna fara vit aftur í skúlan at dansa jólatræ og hugna okkum. Kanska onkur jólamaður við jólapakka verður at síggja.<br>1., 2. og 3. flokkur kann fara í frítíðarskúla og frítíðartilboð kl. 12. |
| . | Áðrenn farið verður í jólafrí, fáa næmingarnir í 7. - 9. flokki síni støðumet. |

*Blíðastu jólaheilsanir og gleðilig jól*
*Skúlin við Løgmannabreyt*